# Nýtt pensjóns- og tryggingartilboð frá Norðoya Sparikassa

**Norðoya Sparikassi bjóðar nú eisini kapitalpensjón saman við lívs- og avlamnistrygging**

PENSJÓN/TRYGGING



*Tummas Eliasen, stjóri í Føroya Lívstrygging, Marner Mortensen, varastjóri í Norðoya Sparikassa, Eyðun Nolsøe, starvsfólkaleiðari í Norðoya Sparikassi, og Bartal Kass, fyrisitingarleiðari í Føroya Lívstrygging*

Týsdagin 15. november skrivaðu Norðoya Sparikassi og Føroya Lívstrygging undir samstarvsavtalu, sum gevur Norðoya Sparikassa rætt til at selja lívs- og avlamnistryggingar frá Føroya Lívstrygging saman við kapitalpensjónini hjá sparikassanum.

Fyri kundan merkir hetta eitt nú, at bæði kapitalpensjónin og tryggingarviðurskiftini verða avgreidd í sparikassanum - alt á einum stað.

Norðoya Sparikassi sigur við hesum, at tey eru fyrsti føroyski peningastovnurin, sum bjóðar eina heildarloysn, har bæði kapitalpensjón, lívs- og avlamnistrygging eru innbygd. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, sparikassin tengir egin tilboð saman við góðum tryggingartilboðum, tí frammanundan bjóðar Norðoya Sparikassi Bústaðarlánstryggingina og Viðskiftalívstryggingina.

**ave**

# Næmingar í Musikkskúlaskipanini til royndir í ljóðførisspæli

**Næstu dagarnir fara 117 næmingar í føroysku musikkskúlaskipanini til roynd í ljóðførisspæli**

MUSIKKSKÚLI



Næmingarnir fáa eina meting í orðum og tølum um teirra framførslu og um teirra førleikar. Royndin fevnir um nøkur tónleikastykki, men eisini um at spæla tónastigar uttanat, spæla frá blaðnum, syngja uttanat og frá nótblaði, at klappa rytmur, lurta og at greina.

Tónleikararnir fáa prógv, tá teir hava staðið royndina. Tað eru átta stig, og oman á hesi átta, eru trý stig samsvarandi krøvum á hægri útbúgvingum. Byrjarar kunnu fara til roynd og fáa eitt skrivligt úttalilsi beinanvegin, við ongum tølum, sigur Martin Mouritsen, musikkskúlastjóri.

Tað er enski metingarstovninum Associated Board of The Royal Schools of Music, ið kemur higar. Stovnurin hevur meira enn hundrað ár á baki og dømir um tónleikaavrik hjá næmingum um allan heim. Sami próvdómari kemur ongantíð aftur á sama stað at døma. Hetta er fyri at tryggja, at próvdómarin er gegnigur.

Royndirnar byrja týsdagin 22. november og halda fram til leygardagin 26. november. Føroysku musikkskúlanæmingarnir fáa undirvísing runt alt landið, og tey, ið fara til roynd hesaferð, spæla á tvørfloytu, blokkfloytu, klarinett, altsaxofon, tenorsaxofon, gittar, klaver, kirkjuorgul, violin, cello, slagverk, trummur, sang, trompet, cornet, waldhorn, baritone, euphonium og trombone. Føroyskur tulkur er til staðar.

Próvdómari er Anthony Froggatt, ið er útbúgvin pianistur, urguleikari og slagverksleikari, komponistur og kórleiðari.

## Fyrilestur um motión

Týskvøldið 22. november kl. 19.30 heldur Hedvig Matras fyrilestur á Klaksvíkar bókasavni um rørslu.

Hedvig Matras arbeiðir sum fysioterapeutur á Klaksvíkar sjúkrahúsi og hevur verið á skeiðum um týdningin av at røra seg. Í fyrilestrinum fer hon at tosa um, hví tað er neyðugt at røra seg, hvørjar ágóðar tað gevur, umframt at hon gevur vegleiðing í gagnligum rørslum og venjingum.

Aftaná fyrilesturin verður høvi at seta spurningar. Eisini verður kaffi og køkur at fáa.

**ave**

# Nýtt frá Bókadeildini

**Bókadeildin hevur júst givið út fýra nýggjar bøkur til yngru lesararnar. Her er alt frá ljósareyðum prinsessudreymum og gomlu søguna um Pinocchio til nýggj ævintýr í besta J. K. Rowling stíli**

BÓKAÚTGÁVA

**Carlo Collodi:** Ævintýrið um Pinocchio




**Lucy Cousins:** Tað er stuttligari saman við Malju




Um músina Malju, sum hevur nógvar vinir. Tey stuttleika sær saman við Malju og súkkla, dansa spæla og baka. Hetta er litrík bók við klaffum, sum er prentað á hart papp og er ætlað teimum 0-2 ára gomlu. Niels Jákup Thomsen týddi úr enskum.

Um sprellimannin, sum fær langa nøs, tí hann er ólýðin. Hetta er triðju ferð, at bókin kemur út á føroyskum, men hesa ferð í sera vakrari útgávu við myndum og vignettum, sum navnframi Roberto Innocenti hevur gjørt.

Bókin er eitt samprent, har amerikanska forlagið Creative Company hevur staðið fyri sniðgevingini. Umframt ta klassisku søguna um Pinocchio eru myndirnar sum rein listaverk á at líta.

Hóast bókin er ætlað børnum í skúlaaldri, er als einki, sum forðar einum vaksnum at ogna sær hesa skreytútgávuna. Stig G.Rasmussen týddi. Bókin er 192 bls.

**Amanda Eriksson:** Mítt ljósareyða lív




Ein myndabók um eina lítla gentu sum ein dagin sær ein ljósareyðan bil og tí fer at droyma um eitt ljósareytt lív, og at dreymar kunnu gerast veruleiki, tað syrgir abbi hennara fyri. Tey fara undir verkætlanina Ljósareytt.

Eingin ivi man vera um, at hetta er bók, sum fer at falla í góða jørð hjá gentum, sum ganga við prinsessudreymum.

Amanda Eriksson hevur bæði skrivað søguna og gjørt myndirnar. Marna Jacobsen týddi úr svenskum. Bókin er 24 bls. og er til tey 3-6 ára gomlu.

**Cornelia Funke:** Tjóvanna harri




Um børn sum ongan góðan eiga. Søgan fer fram í italska býnum Venesia; tað er vetur og bítandi kalt og børnini, sum hava skýli í einum gomlum filmshølum, noyðast at lívbjarga sær á ymsan ikki altíð lógligan hátt. Í grundini er søgan eisini um børn, sum hava onkran góðan, sum kanska ikki eru so góð við tey allíkavæl.

Í Týsklandi verður rithøvundurin kallað tann týska Rowling. Sagt verður eisini, at hetta er meistaraverk, fult á hædd við skaldskapin hjá Michael Ende.

Bókin er ætlað unga lesaranum. Hon er 375 bls.við svørt/hvítum tekningum, sum rithøvundurin sjálv hevur teknað. Símun av Skarði týddi úr týskum